## Klaksvíkar sjúkrahús

## Samskipari til tænastudeildina

Eitt tíðaravmarkað starv sum samskipara er leyst til setan frá 1. januar 2022 til 31. desembur 2022, ella skjótast til ber.  Arbeiðstíðin er 25 tímar/viku.

Tænstudeildin tekur sær av millum annað innkeypi av vørum, klædnavaski og reingerð. Á deildini arbeiða 25 starvsfólk.

**Uppgávurnar eru**:

- samskipandi leiklut í mun til reingerð og ístandgerð
- vegleiða starvsfólk og skipa fyri neyðugari upplæring
- gera arbeiðsætlan
- hjálpa til í leiðbeiningini, og annað fyrifallandi arbeiði
- samskipa uppgávur, t.d. skipan av tiltøkum

**Førleikakrøv**

Vit ímynda okkum at tú:

- hevur áhuga og eyga fyri góðum reinføri
- hevur góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis er samstarvsinnað/ur, fyrikomandi og fleksibul
- ert álítandi, røkin og vælskipað/ur í dagliga arbeiðnum
- sjálv/ur dugir at síggja hvat krevur ábøtur
- hevur viðkomandi starvsroyndir

Tað skal falla tær lætt at brúka KT og at seta teg inn í nýggjar loysnir, tá KT-skipanir stuðla undir arbeiðinum á tænastudeildini.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið, lønarflokk 4.

Hevur tú spurningar ella vilt hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til deildarleiðara, Birnu Jacobsen á telefon 23 54 70.

Umsókn, saman við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum,  skal sendast til: umsokn@ks.fo.

Umsóknarfreistin er 01. desembur 2021.